# Sigur er eitt krav hjá B36



*Arnbjørn Danielsen og hinir í B36 skulu vinna dystin móti Skála sunnudagin, um oddaliðini ikki skulu fara úr eygsjón*

**Dysturin í Gundadali sunnudagin millum B36 og Skála er seinasta útkall hjá B36, um liðið skal gera seg galdandi í oddinum**

UPPTAKT
*Heini í Skorini*

Skála hevur bert fingið trý stig hetta kappingarárið, og eitt av hesum stigum varð ognað á heimavølli móti B36. Tískil má B36 læra av sínum mistøkum, tí einki annað enn ein sigur er nøktandi fyri greipuvinnararnar, um teir skulu gera seg galdandi í oddinum í ár.

### Jens Kristian framvegis skaddur

Hjá B36 er landsliðsleikarin Jens Kristian Hansen framvegis skaddur, og verður verjuleikarin væntandi ikki klárur til dystin sunnudagin. Ungu leikararnir Tórólvur Poulsen og Ragnar Poulsen eru eisini ivasamir til dystin, men tað fer neyvan at broyta nógv uppá byrjunaruppstillingina hjá B36.

Hinvegin er miðvallarin Niels Joensen komin fyri seg eftir drúgvan skaða, og hevur hann ikki spælt ein 1. deildar dyst síðani tíðliga í landskappingini móti HB. Annars eru allir hinir B36 leikararnir tøkir, og m.a. spælir landsliðsleikarin Julian Johnsson sín fyrsta heimadyst í 1. deild í ár sunnudagin.

### Lyklaleikarar ivasamir á Skála

Hjá Skála eru týdningarmiklir stuðulsspælarar ivasamir til dystin í Gundadali. Runavíkingurin Dánjal Hansen og sandoyingurin Kári Nielsen dragast báðir við skaða, og tískil er ógvuliga ivasamt, um teir vera við. Hóast allir aðrir eru tøkir, kann hetta gerast ein stórur missur hjá Skála.

Dysturin sunnudagin er ógvuliga týdningarmikil fyri bæði feløgini, tí bæði liðini hava harðliga brúk fyri stigum. B36 skal aftur hava samband við oddin , meðan Skála berjist fyri at yvirliva í bestu deildini.

# Sundalagið hevur møguleika at taka VB



*Robert Cieslewic og hinir úr VB fáa tað væntandi torført móti einum vælupplagdum liði úr Sundalagnum.*

**Burtursæð frá Zivkovic eru vágbingar væl fyri, og í EB/Streymi eru teir fullir í sjálvsáliti eftir knúsandi sigurin mikukvøldið**

VB-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Í blaðnum í gjár varð sagt, at EB/Streymur við avrikinum mikukvøldið, tá teir vunnu 4–0 á TB, vísti, at teir fara ikki at flyta niður. Spurningurin er so, um tað fer at bera teimum til at sleppa av áttanda plássinum, sum teir hava verið á higartil í ár.

EB/Streymur er tvey stig aftanfyri VB, og um teir skulu sleppa longri upp á støðutalvuna, so verður neyðugt at vinna í morgin.

– Vit eru greiðir yvir, at EB/Streymur er væl fyri, og tað verður torført hjá okkum, men vit plaga at standa okkum væl á heimavølli, heldur VB miðvallarin Palli Augustinussen, sum hevur hagtølini við sær. Í fjórðingsfinaluni í steypakappingini vann VB 2–0 á heimavølli ímóti EB/Streymi.

Hjá VB og spælandi venjaranum Marek Wierzbicki er sama fólkið tókt, sum spældi undan summarsteðginum. Undantakið er Predrag Zivkovic. Hann hevur verið plágaður av knæskaða alt kappingarárið, og tað er hann framvegis. Hann royndi at venja týskvøldið, men tað gekk ikki.

VB hevur spælt tríggjar venjingardystir. Teir hava vunnið 5–2 á TB í Vági, og so vunnu teir báðar dystirnar í kappingini á summarstevnuni í Sumba. Fyrst vunnu teir 13-1 á Royn, og so vunnu teir 9–1 á TB.

### Ronnie tøkur aftur

Hjá Trygva Mortensen og teimum í EB/Streymi er lagið sjálvandi gott eftir góða úrslitið mikukvøldið.

EB/Streymur hevur fingið onkrar spælarar í summarsteðginum. Eitt nú miðvallaran Oddvin Zachariassen, sum skoraði tvær ferðir upp á brotsspark mikukvøldið. Um hann verður ímillum teir fyrstu ellivu í morgin er kanska eitt sindur ivasamt. Liðformaðurin, Ronnie Samulsen, var leikbannaður ímóti TB. Nú er hann tøkur aftur, og hann eigur ivaleyst sjálvsagt pláss ímillum teir fyrstu ellivu.



# Bæði KÍ og HB skulu til próvtøku



*Jón Rói Jacobsen og HB skulu reisast eftir ósigurin í steypafinaluni, meðan Jan Joensen og KÍ ikki mugu tapa dystin, um FM heitið ikki skal fara úr eygsjón*

**HB venjarin ásannar, at tað meiri enn nakrantíð er nú, at hansara menn skulu vísa, hvør dugur er í teimum, og KÍ venjarin heldur, at hansara lið framvegis hevur møguleika at røkka toppinum**

KÍ–HB
*Jóannes Hansen*

Klassikarin millum klaksvíkingar og havnarmenn er nógv meiri spennandi í morgin, enn tað fyrr í summar bar til at ímynda sær, at hann skuldi verða. HB er framvegis oddalið, og eftir ikki serliga sannførandi fyrsta triðing av kappingini tykist KÍ vera á rættari kós.

– Vit eru allir sera harmir um, at tað kiksaði í finaluni. Tað skal nógv til at reisa seg aftur, og tað er stutt tíð frá mánadegi og til sunnudag. Men spælararnir fokusera nú upp á landskappingina. Vit eru á odda, og vit skulu verja støðuna í sera torførum dystum næstu vikurnar. Eftir KÍ á útivølli skulu vit spæla ímóti B36 og so skulu vit til Gøtu, og vit skulu eisini til Runavíkar. Avrikið í seinna hálvleiki í finaluni kunnu vit ikki vera nøgdir við, men nú hava vit møguleikan at vísa, hvør dugur er í okkum, heldur HB venjarin Ion Geolgau.

Fyrr í summar spældi HB treytaleyst 4–3–3, men í finaluni vóru teir í meiri 4–4–2 útgávu.

– Tað er harmuligt, at vit nú eru noyddir at broyta spælskipanina frá tí, sum vit hava vant í eitt hálvt ár. Men vit mugu laga okkum eftir umstøðunum, og tær eru, at vit ikki hava somu manning nú, sum vit høvdu fyrr í ár. Í finaluni var saknurin á Una Arge sera stórur, og hann fara vit framvegis at sakna, staðfestir Ion Geolgau.

Hans á Lag er leikbannaður í Klaksvík, og í vikuni hevur verið eitt sindur ivasamt, hvussu tað verður við HB liðnum í morgin. Jan C. Dam hevur ikki vant síðani ólavsøku, tí hann hevur trupulleikar við fótliðnum. Hann skuldi roynast í gjárkvøldið. Nicu vandi ikki hóskvøldið. Jóhannis Joensen hevði trupulleikar undir venjingini. Ivaleyst vera fleiri av ivasomu monnunum við, men teir vóru eitt sindur fjáltursstungnir, tá vit fyrrapartin í gjár høvdu samband við HB.

Umframt finaluna ímóti NSÍ hevur HB spælt tveir venjingardystir. Teir vunnu 3–0 á B68, og teir spældu 1–1 í Gøtu.

### Fleiri møguleikar

Kurt Mørkøre verður ikki millum teir fyrstu ellivu í Klaksvík í morgin. Men hann verður á dómaraseðlinum, og so fer tíðin og dystargongdin at vísa, um venjarin skal seta seg sjálvan á vøllin í 2. hálvleiki.

– Fyrr í summar spældi eg, tí vit manglaðu fólk. Míni aktivu fótbóltsár eru um at vera farin, og tíbetur sær tað nú út til, at tað ikki verður neyðugt hjá mær at spæla, staðfestir Kurt Mørkøre.

Síðani undan summarsteðginum hevur hann mist Bárð á Lakjuni, men hann hevur fingið Heðin á Lakjuni aftur, og so er tað norðmaðurin Bjarne Vattelstad, sum er komin úr Sogndal, og sum eftir tveir venjingardystir framvegis hevur eftir at vísa, at hann er ein álopsloysn við málum í. Harafturat er Símun Joensen, sum hevur verið í USA í eitt ár, komin aftur til KÍ. Bæði í venjingardystinum á Svangaskarði (2–2) og ólavsøkuaftan ímóti B36 (3–1 til KÍ) var hann í miðverjuni.

Alexander Djordjevic er júst aftur komin úr Jugoslavia, har hann hevur verið í summarfrí, og tískil verður hann neyvan ímillum teir fyrstu ellivu í morgin.

– Vit fara at royna eftir øllum stigunum. Um tað eydnast at vinna, so verða vit rættuliga við í kappingini. Men tað er framvegis rættuliga opið. Fimm tey fremstu liðini skulu øll spæla ímóti øllum, so ivaleyst fara øll at missa, heldur Kurt Mørkøre.

# Nú er gerandisdagur aftur hjá NSÍ

**Fyri fyrstu ferð higartil í ár er kapping um plássini í Gøtu, har teir halda tað vera heilt hugaligt, nú teir eru við í telvingini um oddasessin**

GÍ–NSÍ
*Jóannes Hansen*

Mánadagin vóru teir av góðum grundum kátir á ólavsøku, og týskvøldið vórðu teir heiðraðir í Runavík. Tað er sjálvandi steypavinnararnar úr NSÍ, sum tað snýr seg um. Síðani mikukvøldið hevur tað verið uppgávan hjá venjaranum at fáa spælararnar so at siga at koma niður aftur á jørðina og hugsa um og fyrireika seg til stóru uppgávuna, sum er á skránni í morgin.

NSÍ skal um Gøtueið, har GÍ bíðar. Gøtumenn hava ongantíð fyrr í ár verið so nær oddasessinum, sum teir eru nú.

– Tað verður sera torført hjá okkum. Sjálvandi vilja vit vinna. Um vit sleppa til hús aftur við einum stigi, so verður tað eitt gott úrslit.

Hetta sigur Jógvan Martin Olsen, NSÍ venjarin. Hjá honum verður sammett við finaluliðið neyðugt at gera nakrar broytingar. Pól Thorsteinsson er leikbannaður eftir ólavsøkuútvísingina, og Ulrik Balling er farin av landinum aftur. Kári Hansen noyddist at fara út úr finaluni, og hann er ivasamur. Tað er ein vøddaskaðin í lærinum, sum plágar.

Sonni L. Petersen og Óli Hansen vóru leikbannaðir í finaluni. Teir eru sjálvandi grammir at sleppa upp í part aftur. Djóni N. Joensen, sum væl og virðiliga er komin fyri seg eftir skaðasteðg, loysti av í miðverjuni, tá Pól Thorsteinsson hevði sæð reytt. Hann man ivaleyst vera gott boð upp á avloysara í miðverjuni.

### Nógv fólk

Í sjeynda umfari tapti GÍ á heimavølli ímóti KÍ, og gøtumenn spældu ikki væl. Men í trimum teimum síðstu umførunum undan summarsteðginum gekk sum eftir ánni. GÍ vann hvørja ferð, og tað lagaði seg so mikið væl hjá teimum, at teir rukku fram á næstovasta plássið.

– Tað lagaði seg heilt væl hjá okkum, og sjálvandi er tað hugaligari nú. Dysturin ímóti NSÍ verður torførur, men um tað eydnast okkum at vinna, og um HB ikki fær fult í Klaksvík, so verður tað heilt spennandi, tá vit um fjúrtan dagar fáa vitjan av HB.

GÍ veteranurin Magni Jarnskor veit eisini at siga okkum, at teir hava ikki verið so væl fyri við fólki fyrr í ár, sum teir eru nú. Bárður á Lakjuni er komin úr KÍ, og Popczynski tykist vera komin fyri seg. Tað er kortini ivasamt, um hann verður millum teir fyrstu ellivu í morgin. Bartal Eliasen og Sámal Joensen vóru skaddir undan summarsteðginum, men teir eru komnir fyri seg aftur.

- NSÍ hevur eitt fínt lið, so eg haldi, at allar fyritreytir eru fyri einum góðum og undirhaldandi dysti. At tað verður spennandi er sjálvsagt, heldur Magni Jarnskor.



*Djóni N. Joensen og Pól Ennigarð verða væntandi at síggja í Sarpigerði sunnudagin í grannauppgerðin millum GÍ og NSÍ*